VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingsgrannskoðararnir
Traðagøta 43
Postsmoga 2053
165 Argir

Tórshavn, tann 13. mai 2009
J.Nr.: 200900228 / 2
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: GUA

Tygara skriv:

**Viðv. tyrluflúgving við ferðafólki:**

Vinnumálaráðið skal fyrst siga, at samferðsluøkið varð lagt til Vinnumálaráðið at umsita, tá nýggj samgonga varð gjørd í september 2008. Strandfaraskip Landsins hoyrdu til málsøkið hjá Innlendismálaráðnum áðrenn.

Vinnumálaráðið hevur ikki nakrar viðmerkingar til tað, sum er staðfest í frágreiðingini frá Landsgrannskoðaranum. Víst kann eisini verða til, at Innlendismálaráðið hevur svarað teimum settu spurningunum væl og virðiliga.

Vinnumálaráðið kann tó leggja afturat, at sáttmálin, sum Strandfaraskip Landsins hava við Atlantsflog er longdur til 31.12.2010, sum er samstundis sum sáttmálin hjá Fiskimálaráðnum um SAR við Atlantsflog er uppsagdur. Strandferðslan hevur í hyggju at taka upp samráðingar við Fiskimálaráðið um gerð av einum felags sáttmála við Atlantsflog ella annan veitara.

Vinarliga

Gunnleyg Arnafjall

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
Telefon 30 66 00 • Telefax 30 66 65 • E-mail: vmr@vmr.fo